# ska Grand Prixnum

Áhugin fyri kappingini var lítil, hyggjararnir tímdu ikki at fylgja við, og so vóru tveir møguleikar at velja í. Antin var Grand Prixið koyrt út á ein síðuveg sum ein enn minni kapping uttan beinleiðis sjónvarp, ella var meira gjørt burtur úr kappingini, so fólk aftur fingu áhuga fyri henni.

Valið gjørdist tað seinna – og tað hevur eisini havt við sær, at undirtøkan fyri kappingini nú er munandi størri, enn hon var fyri nøkrum árum síðani.

Grand Prixið er fyrst og fremst ein sjónvarpskapping, og DR1 sendir beinleiðis frá finaluni leygarkvøldið. Føroyska Sjónvarpið spælir sjálvandi við og samsendir við DR.

## Europeiska kappingin

Tann, sum leygarkvøldið vinnur danska Grand Prixið, vinnur sær pláss í europeisku kappingini, sum verður hildin í mai.

Nógv lond eru við í Eurovision-kappingini, og tí skal danska umboðið taka lut í eini hálvfinalu undan sjálvari finaluni.

Bara vertstjóðin Serbia, sum vann kappingina seinast, og stóru londini Frakland, Týskland, Ongland og Spania eiga pláss í finaluni, og øll hini londini skulu tí ígjøgnum tvær hálvfinalu fyri at vinna sær pláss í finaluni.

Hetta verður ikki fyrr enn í mai, og fyrst skulu føroyingar fylgja The Dreams í donsku finaluni leygarkvøldið.




Myndir: Bjarne Bergius Hermansen/DR

### 6

*Lasse Lindorff*

## Hooked On You

29 ára gamli Lasse Lindorff hevur sungið, síðani hann var sjey ára gamal, og fyri fimm árum síðani gav hann eina stakfløgu út í egnum navni. Síðani hevur hann verið við til at skriva og framleiða ein hóp av sangum – millum annað saman við bólkinum Cue Madison, sum hann hevur verið á konsertferð við í Kanada. Lasse Lindorff hevur skrivað sangin Hooked On You saman við Mogens Binderup og Lise Cabble, sum bæði hava skrivað sangir til Grand Prixið áður.



**SMS sang 06 til 1212**

### 7

*Charlie*

## Den Jeg Er

Carina Juul Jensen hevur skrivað sangin Den Jeg Er saman við Andreas Hemmeth, sum er betur kendur undir navninum DJ Encore, ið hevur selt eina fjórðings millión fløgur í USA, Onglandi, Týsklandi og Danmark. Sum sangskrivari hevur DJ Encore verið við til at skriva fleiri enn 50 sangir, og tað hevur gjøgnum árini havt við sær heili 14 gull- og platinplátur fyri fløgusølu. Hesaferð er tað Charlie, sum skal syngja sang hjá DJ Encore í danska Grand Prixnum.



**SMS sang 07 til 1212**

### 8

*Lars & Josefine*

## Sweet Memories Of You

Bæði Josefine Bisgaard Olesen og Lars Holmen Tvergaard hava verið við í sangkappingini Sangstjerner, sum hevur verið at sæð á donsku sjónvarpsrásini Kanal 5. Lars hevur eisini verið vi í tveimum rocksangleikum, sum hava verið framførdir á Viborg Teater. Nú skulu tey bæði royna seg í finaluni í danska Grand Prixnum, og tað gera tey við einum sangi, Maria Montell, Jacob Gurevitsch og Jonas Jeberg hava skrivað. Hetta er ein poppsangur, sum hevur fingið



**SMS sang 08 til 1212**

### 9

*The Dreams*

## La' Mig Være

Føroyski punkbólkurin The Dreams passar ikki rættiliga til Grand Prixið, men tað er júst tað, sum ger teirra luttøku spennandi. Teir halda fast um at spæla tann tónleik, sum teir hava hug at spæla, og teir hava ikki lagað seg til Grand Prixið. Hetta kann bæði verða ein styrki og ein vansi fyri bólkin, nú teir eru slopnir við til finaluna. Sangin La' Mig Være hava teir í The Dreams skrivað saman við kenda danska framleiðaranum Chief 1. Spennandi verður at fylgja føroyska bólkinum í stóru donsku tónleikakappingini leygarkvøldið.



**SMS sang 09 til 1212**

### 10

*Sandee May*

## Spanish Soul

Sandee May er eitt óskrivað blað í donskum tónleiki. Unga songkvinnan hevur seinastu trý árini gingið á studentaskúla í Kalundborg, men leygarkvøldið skal hon syngja fyri eini millión stórara hyggjarafjøld á DR1. Sangurin hjá Sandee May er skrivaður av Lars og Nik Quang, sum saman hava Quang Studios. Lars og Nik Quang hava skrivað nógvan popptónleik, og millum fólkini, sum hava sungið sangir hjá teimum, er Jolin Tsai, sum skal eitast at verða kinesiska svarið upp á Britney Spears.



**SMS sang 10 til 1212**